## Gerðabók hjá Vestmanna bygdarráð
## Eyka bygdarráðsfundur  tann 22. januar 2025, kl. 17.00

**Bygdarráðslimir á fundi:** Sára Jógvansdóttir, Símin Jákup Højsted, Anja Haldansen, Karl A. Olsen, Pauli Magnussen, Jákup S. Jóanesarson og Janus Atli Jensen

**Skrivari:** Rúna Koba

---

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 4**
Val av limum og umboðum
J.nr.: 22042-2-2024

Til støðutakan eru umboð til Ráðið fyri Ferðslutrygd og Barnaverndarnevndina í VEKS.

**Viðv. 4**
Á fundinum skeyt Sàra Jógvansdóttir, borgarstjóri, upp at velja Paula Magnussen sum umboð í Ráðið fyri Ferðslutrygd.

Uppskotið hjá Sáru Jógvansdóttir, borgarstjóra, varð einmælt samtykt.

Á fundinum skeyt Sára Jógvansdóttir, borgarstjóri, upp at velja Jónu Borgarlíð sum umboð í Barnaverndarnevndina og Elin Pedersen sum varaumboð.

Uppskotið hjá Sáru Jógvansdóttir, borgarstjóra, varð einmælt samtykt.

**Mál 5**
Heimild at undirskriva skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t.
J.nr.: 15152-1-2025

Sambært § 44 stk. 2 í kommunustýrislógini (ll. nr. 87 frá 2000 við seinni broytingum) skulu skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t. vera undirskrivað av borgarstjóranum og einum persóni, sum kommunustýrið hevur heimilað til tess.

Umsitingin mælti til at geva Rúnu Koba, kommunuskrivara, heimild til – saman við Sáru Jógvansdóttir, borgarstjóra, ella Símin Jákup Højsted, varaborgarstjóra – tá ið hann virkar í borgarstjórans stað – ella um borgarstjórin gerst ógegnigur – at undirskriva skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t.

**Viðv. 5**
Uppskotið hjá umsitingini varð einmælt samtykt.

**Mál 6**
Stýrisskipan fyri Vestmanna Bygdarráð
J.nr.: 1002-1-2025

Á fundi hjá nývalda bygdarráðnum tann 14. novembur 2024 varð full semja um at broyta stýrisskipanina fyri Vestmanna bygdarráð á einum av fyrstkomandi fundunum hjá bygdarráðnum.

Avtalað varð at umskipa bygdarráðsnevndirnar til hesar nevndir:

Fíggjarnevnd
Tekniska nevnd
Mentanar- og trivnaðarnevnd
Vinnu- og havnanevndin

Uppskotið, dagf. 9. januar 2025, um stýrisskipan fyri Vestmanna bygdarráð varð beint í bygdarráðsnevndirnar til viðmerkingar.

**Tekniska nevnd** viðgjørdi uppskotið á fundi tann 13. januar 2025 og mælti til at góðkenna uppskotið.

**Mentanarnevndin** viðgjørdi uppskotið á fundi tann 13. januar 2025 og mælti til at broyta heitið á mentanar- og trivnaðarnevndini til trivnaðarnevndin.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin** viðgjørdi uppskotið á fundi tann 13. januar 2025 og mælti til at broyta heitið á mentanar- og trivnaðarnevndini til trivnaðarnevndin.

**Havnarnevndin** viðgjørdi uppskotið á fundi tann 14. januar 2025. Nevndin samtykti at spyrja hví hesi mál liggja hjá fíggjarnevndini í uppskotinum um stýrisskipan fyri Vestmanna bygdarráð dagf. 9. januar 2025.

- Vinnuviðurskiftir og líknandi mál
- heilsumál

**Fíggjarnevndin** viðgjørdi uppskotið á fundi tann 15. januar 2025. Nevndin samtykti einmælt at mæla til, at:

- Heilsumál verður flutt til mentanar- og trivnaðarnevdina og at broyta Heilsumál til kommunulækna, barnatannlækna og heilsusjúkrasystir.
- Vinnuviðurskiftir og líknandi mál verður strikað av fíggjarnevndini.

Uppskotið frá umsitingini, dagf. 16. januar 2025, tekur hædd fyri øllum viðmerkingum frá nevndunum.

**Viðv. 6**
Uppskotið dagf. 16. januar 2025 varð einmælt samtykt við 1. viðgerð.

**Mál 7**
Áseting av almennu fundardøgunum fyri 2025
J.nr.: 22022-1-2025

Sára Jógvansdóttir, borgarstjóri, heitti á bygdarráðið um at áseta almennu fundardagarnar fyri 2025 hjá Vestmanna bygdarráði til hesar:

| | |
|---|---|
| Mikudag | 22. januar |
| Mikudag | 26. februar |
| Mikudag | 19. mars |
| Mikudag | 23. apríl |
| Mikudag | 21. mai |
| Mikudag | 18. juni |
| Mikudag | 27. august |
| Mikudag | 17. septembur |
| Mikudag | 29. oktobur |
| Mikudag | 19. novembur |
| Mikudag | 17. desembur |

**Viðv. 7**
Uppskotið hjá Sáru Jógvansdóttir, borgarstjóra, varð einmælt samtykt

**Mál 8**
Leiðslubygnaður fyri Vestmanna kommunu
8100002-1-2025

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 15. januar 2025 uppskot frá umsitingini um at skipa tekniska økið við einum tekniskum leiðara.

Á fundinum skeyt Karl A. Olsen upp at strika kassar, sum bert lýsa funktiónir, og at samtykkja broytingina við tekniskum leiðara.

Uppskotið hjá Karl A. Olsen varð einmælt samtykt.

**Viðv. 8**

Leiðslubygnaðurin varð einmælt samtyktur við broytingaruppskotinum frá fíggjarnevndini.

**Mál 9**
Setanarbólkur til setan av tekniskum leiðara
J.nr.: 8103002-1-2025

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 15. januar 2025 mál um setanarbólk til setan av tekniskum leiðara.

Nevndin mælti til at setanarbólkurin verður mannaður av borgarstjóra, kommunuskrivara og formanni í teknisku nevnd

**Viðv. 9**
Tilmælið frá fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 10**
Umsókn um keyp av lendi burtur av matr. nr. 94e.
J.nr.: 8202002-11-2024

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi 13. januar 2025 umsókn um keyp av lendi burtur av matr. nr. 94e.

Málið er áður viðgjørt. Tá samtykti nevndin í fyrstu syft at svara, at nevndin ikki fær komið við einum endaligum svari, fyrr enn ein heildarætlan er gjørd fyri økið. Somuleiðis metir nevndin, at komandi tekniska nevnd og bygdarráð skulu kunna siga sína meining.

Ein meiriluti, Símin Jákup Højsted og Pauli Magnussen, mæltu til at ganga umsóknini á møti soleiðis, at vegurin omanfyri verður eftir gulari strípu í umsóknini.

Ein minniluti, Janus Jensen, mælti til at gera økið til parkeringspláss og frílendi.

Fíggjarnevndin viðgjørdi tilmælini frá teknisku nevnd á fundi tann 15. januar 2025.

Nevndin samtykti einmælt at mæla til at taka undir við tilmælinum frá meirilutanum í teknisku nevnd og at selja fyri 250 kr fermeturin. Keypari rindar fyri umskipan av lendi.

**Viðv. 10**
Bygdarráðið atkvøddi um uppskotið frá minnilutanum í teknisku nevnd.
Anja Haldansen og Janus A. Jensen atkvøddu fyri uppskotinum.

Sára Jógvansdóttir, Símin Jákup Højsted, Karl A. Olsen, Pauli Magnussen og Jákup S. Jóanesarson atkvøddu ímóti uppskotinum.

Uppskotið fall við tveimum atkvøðum fyri og fimm ímóti.

Bygdarráðið atkvøddi um uppskotið frá meirilutanum í teknisku nevnd og tilmælið frá Fíggjarnevndini.
Tilmælini vóru einmælt samtykt.

**Mál 11**
Umsókn um stuðul – Summartónar 2025
J.nr.: 2000002-31-2024

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 15. januar 2025 umsókn um stuðul frá Summartónum 2025.

Í telduposti dagf. 20. oktobur 2024 sendi Kristian Blak, umsókn um stuðul til summartónar 2025. Søkt varð um kr. 11.000. Á fundi hjá fíggjarnevndini tann 19. novembur 2024 samtykti nevndin einmælt at beina umsóknina fyri fíggjarnevndina sum tekur við í 2025

Nevndin samtykti einmælt at mæla til at stuðla við kr. 11.000.

**Viðv. 11**
Tilmælið frá fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18:45

Sign.:

Sára Jógvansdóttir Símin Jákup Højsted Anja Haldansen

Karl A. Olsen Pauli Magnussen Jákup S. Jóanesarson Janus Atli Jensen